**Javnaðarflokkurin**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 5/2012: Uppskot til samtyktar um at seta í verk sonevndar barnaváttanir í Føroyum**

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Heitt verður á landsstýrið um at leggja fyri tingið lógaruppskot, sum heimilar, at skipan við barnaváttanum kann setast í verk í Føroyum.

Viðmerkingar:

Altjóða kanningar vísa, at millum 10-25 prosent av fólkinum eru fyri kynsligum ágangi sum børn. Óivað er hetta eisini ein umfatandi trupulleiki her á landi.

Til tess at verja børnini í almenna rúminum heitir Javnaðarflokkurin á landsstýrið um at skipa so fyri, at sonevndar "barnaváttanir", kunnu verða kravdar, so tey, sum hava verið dømd fyri at gera seg kynsliga inn á børn, ikki kunnu starvast við børnum undir 15 ár.

Skotið verður upp, at barnaváttanin, eins og í Danmark, verður latin almennum myndugleikum, privatum fyritøkum, ítróttafeløgum og øðrum stovnum, har fólk starvast við børnum undir 15 ár.

Í barnaváttanini, sum er ein víðkað revsiváttan, eru upplýsingar um kynsliga misnýtslu, sum viðkomandi er dømdur fyri at hava framt móti børnum.

Hesi hava skyldu til at fáa til vega, áðrenn tey seta fólk í starv, sum skulu virka sum venjarar, leiðbeinarar, liðleiðarar ella lærarar fyri børn undir 15 ár, herundir eisini hjálparar, vikarar, avloysarar og lesandi í starvsvenjing:

1) Ítróttafeløg og aðrir felagsskapir, har kropslig venjing fer fram
2) Feløg og onnur sambond, eitt nú hugasambond og e-virksemi

3) Musikkskúlar
4) Ballet- og dansiskúlar
5) Ríðiskúlar
6) Venjingar- og fitnessstøðir

**Á Løgtingi, 3. august 2012**

| | | |
|---|---|---|
| **Aksel V. Johannesen** | **Henrik Old** | **Eyðgunn Samuelsen** |
| **Gerhard Lognberg** | **Rigmor Dam** | **Kristin Michelsen** |